Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Fólk til stuðulstoymið í Norðurstreymoy

Stuðulstænastan søkir eftir einum fólki at arbeiða sum stuðul í 14 tímar um vikuna. Talan er um tveir brúkarar, ein 29 ára gamal mann og eina 32 ára gamla kvinnu. Arbeiðið umfatar at fara við teimum hvør sær til ymisk tiltøk aftaná arbeiðstíð og onkuntíð leygarkvøld eisini.

Neyðugt er, at tú hevur koyrikort til bil.

Stuðulstoymið í Norðurstremoy er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur við 4 starvsfólkum

Málbólkurin hjá stuðulstoyminum eru heimabúgvandi fólk yvir 18 ár , ið hava skerdan fysiskan og/ella psykiskan virkisførleika.

Endamálið er at veita sosialpædagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Góðar arbeiðsfelagar í toyminum
- Supervisión
- Fakliga menning,
- Gott samstarv við aðrar starvsbólkar í økinum.

**Vit vænta, at tú**
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkarunum og samstundis arbeiðir professionelt
- Hevur eina jaliga menniskjafatan
- Kanst handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kanna sigast um frammanundan

**Setanartreytir**
Umsøkjari við útbúgving innan almanna- og heilsuøkið og námsfrøðingar, fáa løn eftir sáttmála hjá viðkomandi felag. Fólk við aðrari útbúgving ella ongari útbúgving fáa løn sum hjálparfólk hjá Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við Jónvør Petersen, samskipara tlf.554083

**Umsókn**
Umsóknin skal sendast til:
Nærverkið
Stuðulstænastan
Stílað: Regin Johansen
Argjavegur 26
160 Argir

**Umsóknarfreist: 7. nov. 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri.Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleikan, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

## STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

### Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1 – Endurlýsing

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir tveimum avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar í barnsburðar-farloyvi skjótast tilber og til og við 31. mai 2008 við møguleika fyri leingjan. Starvsbrøkurin er 0,8 ella eftir avtalu.

Bráðdeildin hevur fleiri ymiskar funk-tiónir, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina.

Tú kemur, í mun til tørv og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur. Ta fyrstu tíðina er talan í høvuðsheitum um tað intensiva økið.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- góða innleiðslu og skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- evni til skjótt at skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar inna serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, lokal 5811, t-post lsjorho@ls.fo ella til Hergerð Heldarskarð, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráðdeplinum, lokal 5701, t-post lsherhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 7. november 2008 kl. 12.00**

### Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Yvirlækni til Med. depil**
Umsóknarfreistin er 27. oktober 2008 kl. 12.00

**Deildarleiðari til Tænastudeildina**
Umsóknarfreistin er 27. oktober 2008 kl. 12.00

**Kost- og føðslufrøðingur ella køkshjálp til Køkin**
Umsóknarfreistin er 27. oktober 2008

**Sálarfrøðingur til Psyk. depil**
Umsóknarfreistin er 28. oktober 2008

**Deildarleiðari til B8**
Umsóknarfreistin er 3. november 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 3. november 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo


BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

miðlahúsið
í Vágsbotni

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!